## Sjey funnin myrd

Leygarkvøldið boðaði løgreglan í amerikanska statinum Georgia frá, at sjey fólk vórðu funnin myrd í einum íbúðarøki í Glynn County. Umframt tey sjey myrdu fann løgreglan tvey fólk, sum vóru illa særd, og sum alt fyri eitt blivu flutt á sjúkrahús. Sambært einum blaði var talan um tvey børn. Løgregluovastin í Glynn County sigur við CNN, at tilburðurin er tann versti av sínum slagi tey 25 árini, hann hevur verið løgreglumaður. Hann vildi ikki siga meiri um málið, men sambært einum blaði var tað ósemja um eitt ella annað, sum elvdi til drápini.



## Cheney vildi leypa á

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin Dick Cheney viðgekk í einari sjónvarpssamrøðu í gjár, at hann hevði verið talsmaður fyri, at USA skuldi leypa á Iran fyri at noyða landið at gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Men George W. Bush, forseti, var ímóti at leypa á og vildi heldur royna samráðingarleiðina. Sambært Cheney høvdu ráðgevar forsetans mælt Bush frá at leypa á Iran, tí tað hevði gjørt støðuna í Miðeystri uppaftur verri, enn hon longu var. Í samrøðuni segði Cheney, at kanska var tað hann, sum hevði havt rætt, tí Iran heldur fram við sínum ætlanum.

# Gerhard er púra róligur

**Annika Olsen hevur onki at gera uttan at halda seg til semjuna, sum er gjørd í samgonguni og tað merkir at arbeiðið upp á Sandoyartunnilin skal byrja í 2011. Verður tað broytt, skal eg nokk taka eina avgjørda støðu, sigur Gerhard Lognberg**

SANDOYARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg taki tað púra róligt!

Tað nervar ikki Gerhard Lognberg, løgtingsmann fyri Javnaðarflokkin úr Sandoy, at bæði samgongutingmaðurin úr Sambandsflokkinum, Helgi Abrahamsen, og enntá Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, nú ikki vilja lova, at farið verður undir arbeiðið at gera Sandoyartunnilin í 2011, soleiðis sum Løgtingið annars hevur samtykt.



*- Skuldi nakar hildið, at tað fær okkum at gloyma undirsjóvartunnilin, at landið nú fer at byggja ítróttarhøll í oynni, taka tey dyggiliga feil. So skulu tey heldur strika ítróttarhøllina aftur, sigur Gerhard Lognberg*

Landsstýriskvinnan sigur, at málið skal nú til umrøðu í samgonguni í sambandi við, at almennu íløgurnar skulu raðfestast, men hon leggur dent á, at vit mugu hugsa um búskaparligu støðuna.

- Annika Olsen hevur onki annað at gera enn at halda seg til tað, Løgtingið hevur samtykt og tað er at gjaldið, sum higartil er farið í Norðoyatunnilin, nú skal í Sandoyartunnilin og at farast skal ígongd í 2011.

- Tú ert einaferð farin úr eini samgongu, tí hon ikki vildi fara undir Sandoyartunnilin. Ert tú til reiðar at gera tað einaferð afturat?

- Eg fari ikki taka eina slíka støðu beint nú, tí eg havi ongan trupulleika av málinum. Eg hava ta álit á samgonguni, at hon heldur gjørdar avtalur og tí stúrir eg ikki.

- Men skuldi samgongan kortini lopið frá avtaluni, skal eg nokk taka eina púra greiða og avgjørda støðu í málinum, leggur hann afturat.

### Vigar ikki upp ímóti

Og Gerhard Lognberg ávarar eisini samgonguna:

Samgongan hevur samtykt, at landið skal byggja ítróttarhøll í Sandoy. Men tað skal ongin halda, at hetta nóg mikið til at kyrra sandoyingar og at hetta er nóg mikið til at fáa okkum at sleppa tunlinum.

Tað hevur annars ljóðað, at samgongan hevur samtykt at byggja ítróttarhøllina, fyri at kyrra Gerhard Lognberg, tí tey vita, at tunnilin kemur ikki enn á sinni.

Men hesum vísir løgtingsmaðurin avgjørdur frá sær.

- Tað verður undir ongum umstøðum góðtikið, at ítróttarhøllin verður mett sum ein alternativ íløga ístaðin fyri undirsjóvartunnilin. Skuldi samgongan havt hug til at viga ítróttarhøllina upp ímóti sandoyartunlinum, so er betri at strika ítróttarhøllina aftur, tí tunnilin skulu vit hava, sigur Gerhard Lognberg.

Hann heitir nú á Anniku Olsen um at seta nevndina fyri partafelagið og at fáa tað á føtur, so at peningurin, sum higartil er farin í Norðoyatunnilin, nú kann setast í Sandoyartunnilin.

Hann minnir eisini á, at nú alt landið er eitt valdømi, hava samstundis eisini allir tinglimir fingið ábyrgdina av støðuni í Sandoy.

# Leita eftir sær sjálvum

**- Vit hava mist sambandið við grasrøturnar og tað er ein stórur trupulleiki, sum vit mugu arbeiða við, staðfestir John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum**

SJÁLVRANNSAKING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Ein høvuðstrupulleiki hjá okkum er, at vit hava mist sambandið við grasrøturnar.

John Johannessen, politiskur formaður í javnaðarflokkinum, sigur, at hetta er ein niðurstøða av sjálvrannsakanarfundi í flokkinum fríggjadagin og leygardagin.

Javnaðarflokkurin fekk ein rættiligan skelk eftir at ein veljarakanning í farnu viku avdúkaði, at veljarin mestsum hevur flýggjað undan flokkinum.

Hetta fekk floksleiðsluna at kalla saman til snarfund at viðgera støðuna og í tí sambandinum hittust landsstýrisfólk, løgtingslimir og starvsnevnd floksins á einum slagi av kreppufundi allan fríggjadagin.

- Hetta var ein ærligur fundur, har nógv viðurskifti vóru til umrøðu, sigur John Johannessen.

Men hann vil ikki út í æsir við tí, sum varð umrøtt, tí viðgerðin í flokkinum er ikki liðug enn.

- Vit skulu hava fleiri fundir fyri at bøta um støðuna hjá flokkinum og í hesum sambandi skulu fleiri fundir vera, har eisini limafeløgini verða umboðað.

### Mist sambandi

Hóast hann ikki vil út í æsir, ásannar hann, at ein høvustrupulleiki er, at sambandi við røturnar hevur ikki verið nóg gott.

- Sambandið við grasrøturnar hevur meiri verið ígjøgnum miðlarnar enn tað hevur verið upp ígjøgnum skipanina innanfloks, sigur hann og tí er neyðugt at fáa floksskipanina at virka betri.

Kortini ásannar hann eisini, at teir fólkavaldu politikararnir mugu bera sína skyld av støðuni.

- Tað hava verið ein stórur truppuleiki hjá okkum at tala við einari rødd tí tað hava verið ov nógvar óhepnar fráboðanir ymsastaðni frá. Vit hava verið ov vinglut, tí fráboðanirnar hava verið so ymiskar.

Hann vil hvørki nevna dømi ella nøvn, men ongin ivi er um, at Gerhard Lognberg er ein politikari, ið hugsað verður um, tí hann hevur fleiri ferðir verið í andstøðu til flokkin annars og eitt skifti fór hann enntá úr samgonguni, tí at hann ikki fekk trygd fyri, at farið verður undir Sandoyartunnilin.

Kortini heldur hann, at Javnaðarflokkurin hevur fingið verri orð á seg enn hann hevur uppiborið, tí onkusvegna er tað eydnast at draga alt tað negativa fram í ljósið í sambandi við pensjónirnar uttan at tað verður nevnt, at pensjónin er munandi hækkað hesi árini, Javnaðarflokkurin hevur verið í samgongu.



*- Tað hevur verið ein trupulleiki hjá okkum, at fráboðanirnar frá flokkinum hava verið so vinglutar og at tað hevur gingist illa at tosa við einari rødd, heldur John Johannessen, politiskur formaður javnaðarfloksins*